DAGSINS MEINING

Skynsemi fram um tíð

Skulu tvær stórar verkætlanir í Suðuroy - samferðsluhavnin við Trongisvágsfjørð og Øravíkar-Hov-tunnilin - tengjast saman ella ikki?

Meirilutin í vinnunevndini mælir til at brúkra grótið úr tunnlinum til ta stóru ferjuleguna, sum skal gerast eystan fyri Drelnes. Hetta ber í sær, at nógvar milliónir krónur kunnu sparast. Talið 45 er nevnt. Harafturat er tað skilagott umhvørvisliga at brúka at koyra stutt og brúka grótið beinanvegin. Verður tað ikki gjørt, skal tað koyrast í rúgvur her og har, til tað einaferð verður brúkt.

Tí halda nógv, at meirilutin í vinnunevndini er á rættari leið: at tengja tvey arbeiði saman og spara pening. Hetta er áhugavert og eitt stórt framstig, tí vit síggja alt ov ofta, at mál verða loyst hvør sær uttan eina meira samfelagsgagnliga heildarætlan.

Men hetta tilmælið hjá vinnunevndini hevur tann vansa við sær, at samferðsluhavnin verður ikki liðug til tíðina - til nýggi Smyril kemur til Føroya í oktober næsta ár!

So kann spyrjast hvur tað so stóran týdning? Tað halda summi. Fyrst og fremst suðuroyingar, sum í spenningi bíða eftir eini nútímans ferju. Men eisini landsstýrismaðurin Bjarni Djurholm úr Fólkaflokkinum, sum altíð tosar um sparing, men sum saman við samgonguflokkunum hevur sett met í almennari nýtslu. Nú hevur hann so høvi at vísa sparing í verki.

Fyri at hann kann gera tað, skal fyrst ein verkætlan fyri Øravík-Hov-tunnilin gerast. Landsverkfrøðingurin hevur gjørt eitt uppskot, sum hvørki suðuroyingar ella onnur eru nøgd við. Hesin tunnilin liggur ovarlaga og krevur nógv vegarbeiði. Síðani hava suðuroyingar skotið upp at flytata tunnilin vestur eftir og leggja hann í eina beina linju. Byggisamtakið NCC sigur seg kunna gera hann fyri umleið 100 mió.kr., men samtakið vil ikki taka á seg váðan. Harafturat skal eisini hetta uppskotið kannast betri.

Sjálvandi skal arbeiðið at gera samferðsluhavnina byrja sum skjótast, men tá vit eru í eini støðu, at tvey arbeiði kunnu tengjast saman og vit kunnu spara pening, eigur hetta málið at verða kanna nógv gjølligari. Hetta er ikki eitt krav frá føroyskum skattgjaldarum, men teir vilja, at tann ofta súrt vunnið peningurin verður brúktur so skynsamt sum møguligt.

Og peningurin er ikki skynsamt brúktur, um ein kanning og gott politiskt arbeiði seinri vísir, at hesi arbeiðini kunnu tengjast saman og spara pening.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

03 í málsviðgerð til Løgtingsins vinnunevnd (Subjektiv kolldøming)!

Heri Simonsen
sum hevur koyrikortið sum sítt livibreyð!

Tað letur ikki til, at teir 7 limirnir í løgtingsins vinnunevnd lurtaðu eftir sendingini "Sostatt" fyri 2 vikum síðani. Í sendingini atkvøddu 89% fyri, at ferðslulógin eigur at broytast viðvíkjandi víkiskylduni, bert 11% halda, at lógin eigur at verða óbroytt. Ístaðin fyri at fokusera uppá fólkaviljan, hevur løgtingsins vinnunevnd útilokandi valt at fokusera uppá, at Kári P. Højgaard hevur gjørt sama, keðiliga mistak som onnur hava gjørt í ferðsluni.

Lurtaðu bert eftir einari síðu

Í málsviðgerðini av broytingaruppskotinum hjá Kára P. Højgaard til ferðslulógina hevði løgtingsins vinnunevnd møguleikan at hava teir ymisku partarnir til hoyringar. Teir kundu sent boð eftir bæði Ráðnum fyri Ferðslutrygd, Bileftirlitinum, Føroya Koyrilærarafelag, ferðsluløgreglumonnum, og onkrum, sum er raktur av ferðslulógini. Men boðsendi løgtingsins øllum hesum portum til hoyringar í hesum málinum? NEI! Um tað er av ignoransu, ringari tíð, óvitinheit ella illvilja ímóti Kára P. Højgaard er ilt at siga! Men sannleikin er, at bert Mogens Nepper Christensen, landfúti, Dorthe Møller Anderssen, ákæri og Uni Vestereið, kriminalinspektørur blivu boðsend til hoyringar. Eingin av áðurnevndu ferðsluinstansum ella persónum bleiv boðsendur! Bert ein síða av málinum bleiv hoyrd í hesum fyri mong álvarsmáli!

Eru Nepper og Anderssen "neutral".

Eg havi á egnum kroppi kent hvussu "saklig", "neutral" og "rættvís" Mogens Nepper Christensen og Dorthe Møller Anderssen kunnu verða. Fyrst reistu tey eina ákæru, um at undirritaði hevði brotið víkiskyldu við hávatonnum og tríkanti. Tá tey frættu, at hvørki hávatenn ella tríkantur vóru á staðnum, sum óhappið (undir arbeiði) hendi tóku tey bara og broyttu ákæruritið, men kravdu framvegis somu revsing!! 3 postmenn brutu víkiskyldina í 2000 og 2001, hinir báðir fingu fráfallubræv frá ákæruvaldinum, meðan undirritaði bleiv einsamallur drigin í rættin! Ákæruvaldið toldi heldur ikki, at undirritaði kritiseraði tey fyri ikki at uppklára eitt grovt brot á ferðslulógina, har undirritaði var offur sjálvur. Í rættinum bleiv eg bæði álopin og snigálopin við øllum møguligum ákærum og ákoyringum frá Dorthe Møller Andersen, sum forrestin enn ikki skilir føroyskt til fulnar, men mátti hava málsliga hjálp í fleiri førum undir rættarviðgerðini. Hetta hóast hon hevur búð her í 3 ár! Men fast taki ákæruvaldinum, eg vann sakina, sjálvt um eg "bare er et skide postbud". Aldrin hevur nakar sigur verið mær søtari!

Virðingin á sama støði!

Virðingin hjá løgtingsins vinnunevnd fyri Kára P. Højgaard er á júst sama lága støði, hann er bara eitt "skide postbud", sum hevur gjørt eitt menniskjaligt mistak, og skal tískil ikki hava møguleikan at koma við broytingum til ferðslulógina. Um vit hyggja eftir aldrinum hjá teimum 7 limunum í løgtingsins vinnunevnd, so síggja vit, at bert Bárður Nielsen hevur aldur og ungdómsminni til at klára teoriroyndina fyrstu ferð. Hinir 6 eru komnir so mikið til árs, at teir høvdu ikki staðið fyrstu ferð, uttan so, at teir høvdu farið á eitt drúgt teoriskeið. Nepper vil hava, at alt skal verða sum í Danmark. Men vit hava ikki somu fysisku umstøður, sum í Danmark, t.d. víkiskyldu fyri súkklubreytum (cykelstier)! Hvar eru súkklubreytirnar í Føroyum? Og er sданið ikki mangan betri við krossvegir í Danmark?

P.S. Nú verða tiltøk sett í verk!

Flaggdagshald í Kollafirði

TÍÐINDASKRIV

KFUM og K skótarnir í Kollafirði skipa fyri flaggdagshaldið í skúlagarðinum í Kollafirði flaggdagin kl. 15.00.

Skrúðgonga við skótum og ítróttarfólkið ferð frá Bygdarhúsinum og gingið verður út í skúlagarðin har Heðin Zachariasen flytur fram røðu og horntónleikur við luttøku úr Frelsunar herðinum verður at hoyra. Aftaná verður bjóða til cacao og bollar í skótahúsinum.

Flaggdagshald í Fuglafirð

Fríggjadagin 25. apríl skipar Fuglafjarðar Hornorkestur fyri flaggdagshaldi við Kunningarstovuna í Fuglafirði kl. 16.30.

Fuglafjarðar Hornorkestur spælir - og skótarnir ganga skrúðgongu.

Flaggdagsrøðari í ár verður løgtingsmaður Hergeir Nielsen.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstaðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfar. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

Jógvan Arge vil forða fyri, at Tekniski skúli og Handilsskúlin í Havn verða bygdir

Heðin Mortensen

Jógvan Arge royndi í eini blaðgrein fyri páskir at geva mær skuldina fyri, at hann sum formaður í løgtingsins mentamálanevnd ikki hevði klárað at avgreitt málið um bygging av Tekniska skúla og Handilsskúlanum í Havn.

Málið varð eftir 1. viðgerð í Tinginum tann 6. mars beint í mentamálanevndina, og har kann tað sambært tingskipanini í mesta lagi liggja í ein mánað. Tí skuldi eingin havt nakran trupulleika við at hildið páskafrí tann 15. apríl, og heldur ikki skuldi tað gjørt nakað, um løgtingsformaðurin "plantaði ein tingfund" tann 8. apríl, um nevndarformaðurin bara helt seg til tíðarfreistina. Men tað gjørdi hann ikki, og nú skulu onnur hava skuldina fyri tað.

Jógvan Arge sigur í greinini, at mentamálanevndin kundi ikki halda fund tann 15. apríl, tí sambandsmaðurin Heðin Mortensen fór av landinum í páskafrí. Nú er tað soleiðis, at allir sjey limirnir í mentamálanevndini hava hvør sín varalim, so um trupulleikin var, at undirritaði var burturstaddur, so kundi formaðurin bara givið varamanninum fundarboð ístaðin.

Harafturat skal vísast á, at á fundunum sum mentamálanevndin hevði 25. mars og 1. apríl, var nevndin ikki fullmannað. Hví kundi nevndin so ikki eisini halda fund 15. apríl, uttan at vera fullmannað ?

Nei veruleikin er, at Jógvan Arge ætlaði ongantíð, at málið um Tekniska skúla og Handilsskúlan í Havn skuldi koma aftur í tingið. Hann ætlaði at málið skuldi verða liggjandi í mentamálanevndini til Tingið fór í summarfrí, og harvið skuldi tað fella burtur. Fyri at forða hesum, skeyt eg upp fyri tinginum, at málið kom til 2. viðgerð uttan álit frá nevndini, men tað uppskotið fall.

Trupulleikin er, at Jógvan Arge er ikki bara tingmaður í samgongu. Hann er eisini børáðslimur í andstøðu. Í børáðsandstøðuni "brennur hansara hjarta" fyri Havnini, men í Løgtinginum, har hann er í samgongu, er hann ikki so heitur fyri Havnini (var millum annað í hesi vikuni við til at senda havnarborgarum eina roknin á 4,3 mió. krónur, fyri væntandi barnaansing). Kemur málið aftur í tingið, so fær hann ein trupulleika sum samgongutingmaður, um hann atkvøður fyri uppskotinum. Men hinvegin, so fær hann ein annan trupulleika sum andstøðulimur í børáðnum, um hann atkvøður ímóti. Tí roynir hann av øllum alvi at halda málinum aftur.

Við sínum taktiska snildi, setur hann málið á fundarskránna hvørja ferð tá mentamálanevndin hevur fund, men syrgir altíð fyri, at tað stendur niðast á skránni, soleiðis at stundir ikki vara at viðgera tað. Tí verður hetta málið útsett til "næsta fund", har tað aftur stendur niðast á skránni. Tann 24. apríl hevur mentamálanevndin aftur fund, og tá hevur hann sett eitt mál sum er lagt fyri tingið tann 11.apríl fyrst á skránni, meðan málið um Tekniska skúlan og Handilsskúlan sum varð lagt fyri tingið tann 4. mars stendur niðast.

Vit kunnu tí bara staðfesta, at sitandi samgonga hevur ongan skúlapolitikk, og sær tað eftir øllum at døma ikki sum nakran trupulleika, at Tekniski skúli í Havn hevur livað við fyribilsloysnum í 25 ár.

Minningarorð um mín kæra verfaðir og lærumeistara

Robert Brockie

f. 12 sept. 1926 – d. 13. apríl 2003

At sita her og skriva minningarorð um teg góði Bobby, fellur mær ikki lætt. Ikki tí, minnini um teg havi eg nógv, men vildi heldur ynskt at hetta var ein føðingardagsheilsan, ið eg skrivaði. Teir seinastu dagarnir hava verið tungir og einasta troyst nú, er, at tú onga pínu hevur meir, men hevur fingið frið.

Tú varð føddur í Edinburgh í 1926, elstur av trimum systkjum. Í 1933 var pápi tín biðin um, at verða leiðari í handilsfyritøkuni Charles Mauritsen í Føroyum. Fyritøkan var úti í Tinganesi og átti hon allar teir reyðu bygningarnar, har landsstýrið í dag húsast.

Í apríl 1934 flutti so øll familjan til Føroya, og hóast bondini til Skotlands vóru sterk, so vóru tit øll verandi í Føroyum.

Tú kom at vaksa upp úti í Tinganesi, bústaður tykkara varð tann uttasti bygningurin og vóru hinir bygningarnir brúktir til skrivstovur, lagur og annað.

Tú gekk í skúla hjá nonnunum og var tað skjótt, at tú hevði lært tað føroyska málið.

Sum hjá øllum øðrum tá í tíðini, fekk tú skjótt ábyrgd og kom at hjálpa til við øllum fyrifallandi arbeiði í fyritøkuni.

Tá kríggið brast á og Føroyar blivu hersettar av bretum, vart tú málsliga so væl fyri, at tú bleiv bráktur sum tulkur millum bretar og føroyingar. Tú var eisini við, tá leitað varð eftir einum hóskiligum stað, at leggja ein flogvøll.

Hetta var sjálvsagt ein serlig tið fyri øll og soleiðis eisini fyri teg. Pápi tín var bretskur konsul eitt tíðarskeið tá, og komu nógv fólk í heim tykkara.

Nógvar upplivingar hevði tú frá hesi tíðini og so nógv vart tú avhildin av teimum skotsku hermonnunum, at tá teir á veg heimaftur, stóðu umborð á herskipinum, spælandi uppá sekkjapípu, steðgaðu teir á óroptu av skipinum »this is for you Bobby« og so spældu teir »Amazing Grace«.

Í 1946 giftist tú við Ninu Hansen úr Funningsfirði og búðu tit tey fyrstu árini inni hjá foreldrum tínum úti í Tinganesi, har Alan eisini varð føddur.

Seinni keyptu tit hús uppi á Ternuryggi og mundi hetta vera ein stór broyting hjá tykkum. Tá var eingin vegur niðan til húsini, klæðini blivu vaskaði í ánni og langt var oman í býin. Har komu Derek og Edna til verðina.

Í 1955 keyptu til grundstykkið í Pedda við Steinsgøtu og í 1956 fluttu tit inn í tykkara nýggja heim, har Robbie sama ár varð føddur og tvey ár seinni varð Ian føddur.

Hetta hugnaliga heim bleiv ramman um tykkara lív saman.

Tú var eisini umboðsmaður fyri teir bretsku trolararnar og var hetta ein ógvuliga strævin tíð. Tað var heilt vanligt, at tú á náttartíð varð vaktur, tí onkur hevði brúk fyri tínari hjálp. Tú endurstovnaði Havnar Svimjifelag og legði tú eitt stórt arbeiði í hetta. Tú vart formaður í felagnum í fleiri ár. Tú var ærislimur og var líka til nú, við til at handa heiðursmerkir.

Í 1963 flutti fyritøkan Charles Mauritsen niðan í bygningin í Jónas Broncksgøtu, og har kom eg gjøgnum míni barnaár, at síggja henda sera blíða mannin, sum ein daglig mynd í mínum lívi, uttan at vita, hvussu stóran týdning, hann seinni kom at hava fyri meg.

Í 1974 yvirtóku pápi tín, tú og systrar tínar fyritøkuna og kom hon at eita P/F Robert P. Brockie & Co. Sama ár, kom eg fyrstu ferð inn í tykkara heim.

Tykkara heim og hjúnalag var fyrimyndarligt. Tað var hugnaligt og altíð var nógv fólk inni.

Minnist allar løturnar runt um borðið í spísistovuni. Har bleiv lisið, práta, spælt kort og Nina plagdi at leggja stór puslispøl, ið fylti alt borðið. Tú sat mangan og arbeiddi við pappírum, men tá gav eg mær ikki rættiliga far um, hvat tað var tú tókst við. So skjótt sum sólin tittaði framm, vóru stólar fluttir út í havan, síggi teg fyri mær, sitandi í einum hjørni við eini bók, tú læs altíð so nógv.

Næstan á hvørjum ári, legði tú ætlanir um summarferiu í Skotlandi. Tær dámdi væl at sleppa til Skotlands at vitja familjuna, ikki altíð bar til at sleppa avstað, men tá tit fóru, reikaðu tú runt við einari rúgvu av minnisseðlum og ferðaætlanum, sjálvur tvíhelt tú altíð, at tú ikki hevði »rejsufepur« men vit onnur vistu betur og Nina við sínum stilla sinni flenti bara at tær.

Í 1979 spurdi tú meg, um eg vildi koma í læru á skrivstovuni hjá tykkum. Sjálvt hevði eg ongantíð havt ætlanir um at arbeiða á skrivstovu og í nógv ár aftaná, argaði tú meg við, at tað tók tær hálvt ár, at yvirtala meg, so í 1980, sama ár sum pápi tín andaðist, byrjaði eg læruna við tær sum lærumeistara.

Betur lærumeistari enn tú, finst neyvan. Har var ikki gingið lætt um nakað, alt bleiv lært frá grundini av, tað skuldi verða ordan í øllum, áðrenn tað var latið úr hondum. Tú setti eina stóra æru í, at ongin skuldi seta ein fingur á nakað og tað kundi heldur ongin nakrantíð gera. Allar kalkulatiónirnar og allar bókingar blivu eftirkannaðar, kassin skuldi stemma og alt skuldi gjaldast til tíðina. Tú dugdi ótrúliga væl, at læra okkum at hava ábyrgd av tí, ið vit gjørdu. Góði Bobby, tað er bert ein lítil mánaði síðani at vit tosaðu saman, um júst hesi tingini, og eg segði tær, hvussu nógv, tú

hevði lært meg.

Árini á skrivstovuni knýttu okkum sera nógv saman, vit arbeiddu so tætt saman, at tú mangan plagdi at taka til, at tað ikki var neyðugt hjá okkum at tosa, tað var telepati okkara millum. Hetta nevndi tú aftur, fyri bert nøkrum døgum síðani, eg var til arbeiðis men fekk hug at vitja teg á sjúkrahúsinum og tá eg kom inn, lá tú so bleikur og ússaligur í songini, tú hugdi uppá meg og við einum lítlum smíli segði tú »telepatinum feilar í øllum førum onki«.

Fyri meg bleiv tú næstan tann faðirin, ið eg misti sum barn, tú bleiv tann vinurin, ið eg kundi tosa við um alt. Var eg kedd um nakað, vistu tú tað, áðrenn eg hevði talað eitt orð og vit høvdu nógvar djúpar samrøður um lívsins viðurskiftir.

Minnist tá eg á skrivstovuni í 1992, skuldi siga tær, at eg gekk við tí triðja barninum. Eg hevði eitt sindur ringt við at siga tað, tí sum alla aðrastaðni í kreppuárunum, var arbeiði hjá okkum eisini minkað og nú skuldi eg bíða um farloyvi. Tá eg so hevði sagt tað, tókst tú um meg, mussaði meg á kjálkan og segði, at tú so hopaði, at tað var ein lítil Robert, hvat tað so eisini, tú tína gleði bleiv.

Tú hevði eitt lætt sinni, var sera skemtiligur, umhugsin og hevði lætt við at umgangast fólk. Tað sást eisini aftur í tínum samskifti við fólkið á Skipafelagnum, tollstovuni, havnaskrivstovuni, bankunum, posthúsunum og aðrastaðni. Hetta vóru ikki bert fólk, ið arbeiddu har, nei tú kendi nøvnini á øllum, tosaði sum um tað vóru tíni vinfólk.

Tú upplivdi rættiliga nógv í tínum lívið, og tú visti ótrúliga nógv. Eg plagdi ofta at siga við teg, at tú skuldi skriva endurminningar, tá plagdi tú flennandi at svara, at tað kundi tú fara at gera, tá tú bleiv gamal.

Í 1994 andaðist Nina og var hetta ein dyggur smeitur fyri teg. Tú hevði ilt við at fóta tær aftur, bleiv sjálvur sjúkur og við árslok 1995, avgjørdu tit at halda uppat við heilsøluni.

Til alla lukku, knýtti tú seinni vinarbond við Frynhild og fingu tit nøkur góð ár saman. Tit vóru fleiri uttanlandstúrar, sum tú var sera glaður fyri.

Seinasta summar gjørdist tú sjúkur og komst tú ongantíð heilt fyri teg aftur, til tú nú gjørdist rættiliga sjúkur og andaðist.

Ongantíð fyrr, havi eg verið í kirkjugarðinum í só góðum veðri, sum til tína jarðarferð. Sólin sum tú elskaði so nógv, bakaði niður yvir okkum og tú kendist so nær.

Mín samkensla fer til tykkum Alan, Derek, Edna, Robbie og Ian, svigar-, abba- og langabbabørn, nú tit hava mist tykkara kæra pápa, verpápa, abba og langabba. Hann var sera góður við tykkum øll og tit hava øll, nógv góð minnir um hann.

Til tín góða Frynhild og børn tíni, ið hava verið sera nógv um Bobby tey seinastu árini. Takk fyri at tit vóru so góð við hann. Eisini tykkum var hann sera góður við og verður henda tíðin tung hjá tær Frynhild, men minnini hevur tú, at líta aftur á.

Eisini til Celiu og Moiru v/ familju við djúpastu samkensluna nú tit hava mist tykkara kæra bróðir.Góði Bobby, takk fyri alt tú hevur lært meg og alt tú hevur verið fyri meg.

Við hesum orðum lýsi eg fyri yvir minnið um Bobby

Elin